# Handilsskúlin

*Lærugreinakunngerð* *Februar 2000*

## Visuel marknaðarførsla

*Endamál*

**1.** Endamálið við undirvísingini er, at næmingurin skal menna grundleggjandi førleikan at arbeiða við visuellari marknaðarførslu (dekoratión) í royndum. Við dømum, verkligum og ástøðiligum, ognar næmingurin sær vitan um meginreglur í visuellari marknaðarførslu, eins og næmingurin skal læra at nýta ljós, skelti og litir í sambandi við framsýnandi søluarbeiði á hóskandi hátt.

*Undirvísingin*

**2.** Næmingurin skal ogna sær vitan um hesi evni:

1. *Litlæra:* NCS - litskipanin (Natural Color System), og hvussu hon verður brúkt í verki.
2. *Tilfarslæra:* tilfar, sum er vanligt at nýta í sambandi við dekoratión.
3. *Visual merchandising:* sýna fram vørur o.a.
4. *Ljós:* ymsar ljóskeldur og nýtsla.
5. *Skelti:* evna til og skriva skelti í ymiskum støddum.

*Innihaldið í undirvísingini*

**3.1.** Í *litlæru* skal næmingurin við dømum læra, hvussu henda grein verður nýtt í sølufremjandi arbeiði, bæði í sølurúmi og í vindeyga. Næmingurin skal ogna sær vitan um NCS-skipanina og duga at seta saman ein litklingru við 40 litum. Næmingurin skal gera royndir við ymiskum litum, duga at greiða fra litklingruni og littríkantinum, samstundis sum hann skal duga at skipa litirnar innanhýsis. Harafturat skal næmingurin duga at seta litir saman og greiða frá, hvørja sálarfrøðiliga ávirkan litir hava.

**3.2.** Í *tilfarslæru* skal næmingurin hava kunnleika um tilfar, sum vanliga verður nýtt í sølufremjandi arbeiðinum, t.d. dúkar, molton, hessian, tapet, máling og ymisk plastsløg.

**3.2.** Í *Visual merchandising* skal næmingurin læra um teir vanligastu hættirnar at nýta og seta upp innbúgv í einum søluhøli, m.a. við atliti at gonguplássi. Hann skal vita, hvørjir vørubólkar skulu standa saman bæði í søluhølinum og í sýnisgluggum, duga at seta saman litir, nýta rætt slag og rætta mongd av ljósi, eins og duga at nýta rættu skeltini - tað er galdandi fyri stødd, tal, lit og tekst í sambandi við sølufremjandi tiltøk, bæði í søluhølinum og sýnisgluggunum. Hann skal duga at seta upp skipanir eftir tí symmetriska háttinum og duga at tekna eina symmetriska uppseting, bæði sum flatmynd og sæð frammanifrá í mátinum 1:10. Hann skal duga at sýna fram eftir tí asymmetriska háttinum og at tekna uppsetingina bæði sum flatmynd og sæð frammanifrá í mátinum 1:10. Hann skal vita um ymiskar pallstøddir, t. d. tann gylta skurðin, og duga at seta hesar saman á ein hátt, sum fremur dýpi, hædd og breidd í framsýningini við atliti at tí

plássi, ið er til taks. Næmingurin skal duga at seta saman litir til tess, at vøran best kemur til sín rætt í framsýningini. Hann skal duga at gera og skriva við hond skelti og prísskelti, soleiðis at tey natúrliga hóska til tað, sum er sýnt fram, og duga at nýta rútmu, samlag og javnvág í einari framsýning. Næmingurin skal harumframt duga at nýta hugtøkini hæddarkontrast, formkontrast og rætningskontrast og í verki nýta hesi hugtøk í eini framsýning. Harafturat skal hann duga at gera skitsu av eini framsýning og duga at skipa eina framsýning av vørum við skeltum á søluborðum og/ella sýnisgluggum.

**3.3.** Í *ljóslæru* skal næmingurin læra og síggja dømi um, hvussu ymsar ljóskeldur ávirka litir. Hann skal duga at skilja millum tær tríggjar ljóskeldurnar: spot, effekt og vanligt ljós, og kunnast um, hvørjar reglur galda fyri el-innleggingar.

**3.4.** Í *skeltisskriving* skulu næmingarnir vita um týdningin av at nýta røtt skelti. Talan um 3 sløg av skeltum :

- Prísskelti,
- Átaksskelti,
- Kunnandi skelti.

Í hesum høpi verður vitjað í handlum og tænastufyritøkum. Næmingurin skal duga at skilja millum hondskrivað, maskinskrivað ella telduframleidd skelti. Hann skal kunnast um sereyðkenni við ymiskum skrifthættum. Hann skal duga at skriva prísskelti í rættari hædd og breidd, samanborið við støddina á skeltinum. Hann skal við hóskandi penni duga at skriva skelti, sum eru lætt at lesa við ymsum hæddum og breiddum av bókstavum, eins og vísa, at hann dugir at seta orðini saman á ein hátt, sum passar til støddina á skeltinum. Hann skal harafturat duga at skilja og leggja fram dømi um týdningin at hava rættan lesirætning, javnvág, bæði viðvíkjandi teksti, tøl og bredda á viðkomandi skelti. Næmingurin skal vita um týdningin av samanseting og kontrastum á einum skelti, tá talan er um litir, stødd, styrki, hall, form og rættning, og duga at skriva eitt skelti við støði í hesum.

**3.5.** Kunningartøkni er partur av undirvísingini, við serligum denti á telduskráir, ið verða nýttar í sambandi við evnini 3.1.-3.4.

**3.6.** Lisnar verða 100-120 síður av ástøðiligum tilfari, treytað av valda undirvísingartilfarinum.

*Próvtøkan*

**4.** Hildin verður ein ástøðilig og verklig próvtøka. Allir hjálparmiðlar eru loyvdir.
**4.1.** Próvtøkan hjá einstaka próvtakaranum varir 5 tímar og er í trimum pørtum.

**4.2.** Fyrsti partur er ein skrivlig ástøðilig próvtøka, ið varir 60 minuttir, har próvtakararnir hvør sær loysa somu uppgávu.
Hesin parturin av próvtøkuni telur 25 % í dømingini

**4.3.** Annar partur, ið varir 60 minuttir, byrjar aftaná ein steðg uppá 15 minuttir. Einstaki próvtakarin ger 6 prísskelti í støddunum A7, A6, A5, A4, hálv A6 og hálv A7. Skeltini eru grundarlag fyri døming.
Hesin parturin av próvtøkuni telur 25 % í dømingini.

**4.4.** Seinasti partur varir 3 tímar samanhangandi, og fer fram aftaná ein steðg upp á 1 tíma eftir 2. part.
Hesin partur av próvtøkuni fer fram í dekoratiónshølinum, og próvtakararnir skulu hvør sær prýða eitt vindeyga. Hesin partur av próvtøkuni telur 50 % í dømingini.

**8.** Givið verður 1 próvtal. Próvtalið verður givið við støði í úrslitunum av teimum 3 pørtunum.

## *Tilfarslisti*

Til tess at fremja undirvísing og próvtøku í lærugreinini **visuel marknaðarførsla** skal fylgjandi tilfar vera tøkt:

Ávís nøgd av:
- Papppakningi av frystivørum
- Pakningi av mjólkaúrdráttum
- Pakningi av turrvørum
- Blikkum til niðursjóðaðar vørur
- Vínfløskum
- Kosmetikkpakningi
- Matstelli
- Kitlum.

Annars sum hjálparvørur:
- Gløs
- Serviettar
- Skreytlutir (plastfruktir, plastblómur og- plantur o.a.)
- Dúkar
- Prýðislutir og aðrar lutir, sum passa til ta einstøku prýðingina.

Av amboðum skal m.a.vera tøkt:
- NCS - litatlas og kort
- Litroyndir
- Penslar
- Litir
- Skriviamboð
- Papp og pappír
- Klæði í ymsum litum
- Lím og klistriband
- Saksar og knívar
- Tráður av ymsum slag
- Verktoyskassi við viðkomandi amboðum
- Stabbar í ymsum støddum
- Ymsar ljóskeldur.

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**

**25-02-2000**